Álit

í

løgtingsmáli nr. 37/2023: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt (Skattalógin) (Skattaumskipan 2024 og 2025, stigvís minking av fiskimannafrádráttinum og avtøka av samdøgursfrádráttinum og uttanlandsfrádráttinum)

Landsstýriskvinnan í fíggjarmálum, Ruth Vang, hevur lagt málið fram 3. november 2023, og eftir 1. viðgerð 7. november 2023 er tað beint Fíggjarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 9., 13., 16. og 30. november og 6. desember 2023.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við Samtak, Føroya Fiskimannafelag og Maskinmeistarafelagið, Áhugafelagið Antares, Landsfelag pensjónista, Reiðarafelagið, Skipara- og navigatørfelagið, Vinnuhúsið, Búskaparráðið, Landsbankan og í tveimum umførum landsstýriskvinnuna í fíggjarmálum, Ruth Vang, seinnu ferð saman við TAKS.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Eyðgunn Samuelsen, Bjarni Hammer, Eirikur í Jákupsstovu og Hanna Jensen) hevur hesar viðmerkingar:

Samgongan hevur í samgonguskjalinum sett sær fyri at veita ein skattalætta til lág- og miðalløn.

Fyri at liva upp til, at skattalættin er fult fíggjaður, er talan vorðin um eina skattaumlegging, har hvørt fíggingarátak verður viðgjørt í serstakum løgtingsmáli.

Hetta uppskotið snýr seg um fiskimannafrádráttin, uttanlandsfrádráttin, samdøgursfrádráttin og frádráttin fyri sosial gjøld (§ 154 b).

Skipanin við fiskimannafrádráttinum er háttað soleiðis, at allir fiskimenn uttan mun til inntøku fáa ein frádrátt á 14% av inntøkuni upp til 470.000 kr.

Eftir uppskotinum verður fiskimannafrádrátturin stigvíst lækkaður tvey tey næstu árini. Frádrátturin lækkar í 2024 úr 14% av 470.000 kr. niður í 14% av 400.000 kr. og í 2025 niður í 14% av 300.000 kr., tilsamans við einum skattligum virði á 11.900 kr.

Framvegis fáa allir fiskimenn, uttan mun til inntøku, frádráttin við lækkaðu upphæddini.

Samstundis fáa allir fiskimenn eisini lut í skattalættanum.

Undir viðgerðini hevur Fíggjarmálaráðið latið nevndini skjal, ið lýsir ætlaðu broytingarnar í serskipanunum. Eisini er yvirlit yvir inntøkur hjá hesum bólkum, soleiðis sum tær eru skrásettar hjá TAKS. Talan er um inntøkur, sum persónar hava frá ávikavist fiskiskapi við føroyskum ella útlendskum skipum og frá aðrari inntøku uttanlands.

Fyri fiskimenn í Føroyum sæst, at ein stórur bólkur hevur rættiliga lágar inntøkur. Knapt 900 fiskimenn hava inntøku undir 300 tús. kr., og fyri hesar persónar verður fiskimannafrádrátturin óbroyttur.

Tann bólkurin, ið hevur inntøku millum 300 og 660 tús. kr., fær ágóðan av skattalættanum og hevur tí ikki miss í nettoinntøkuni.

Tað eru umleið 600 fiskimenn, ið hava inntøkur omanfyri 660 tús. kr., og hjá hesum bólki er missurin av fiskimannafrádráttinum størri enn skattalættin.

Forvinnur eitt sjófólk við føroyskum fiskiskipi til dømis 800.000 kr. um árið verður skattalættin í 2025 kr. 3.050, meðan missurin í sjómannafrádrátti er kr. 11.900. Hesi sjófólk hava tó framvegis fiskimannadrádrátt á 14% av teimum fyrstu 300.000 kr., sum hevur eitt skattligt virði á umleið 21.000 kr., ið fólk við starvi á landi ikki hava møguleika fyri.

Viðvíkjandi fiskimonnum uttanlands hevur nevndin fingið upplýst, at tað er sera ymiskt við endurgjaldi frá arbeiðsgevara fyri ferðing; nakrir bólkar fáa fult endurgjald meðan flestu fiskimenn gjalda ein part av ferðakostnaðinum. Tí metir meirilutin tað vera skynsamt at halda fast í einum parti av samdøgursfrádráttinum.

Í hoyringarskrivi til nevndina hevur Føroya Fiskimannafelag gjørt vart við, at sjómenn hava ikki nóg góðar skipanir, tá ið sjúka rakar. Hetta er tó ikki beinleiðis tongt at fiskimannafrádráttinum, men heldur ein partur av lønar- og arbeiðsviðurskiftum. Meirilutin heldur, at hetta er nakað, ið eigur at verða eftirhugt.

Samdøgursfrádráttur

Sambært uppskotinum verður samdøgursfrádrátturin, sum í dag er 300 kr. um dagin, lækkaður við 60 kr. hvørt ár soleiðis, at hann er heilt burtur í 2028.

Tað eru umleið 500 fólk, sum seinastu árini hava havt rætt til samdøgursfrádrátt. Hjá størsta partinum av hesum hevur frádrátturin avmarkaðan týdning, men hjá bólkinum føroysk sjófólk við norskum fiskiskipum, sum í løtuni telur umleið 170 fólk, fer stigvísa avtøkan av frádráttinum at hava eina ávirkan. Sum nevnt omanfyri mælir meirilutin við broytingaruppskoti til at ikki at avtaka frádráttin heilt. Sostatt verður samdøgursfrádrátturin verandi 120 kr. um samdøgrið frá 2026.

Linking

Eftir norðurlendsku dupultskattaavtaluni ber til at skifta prinsipp fyri avtøku av tvískatting frá eksemption til credit. Fíggjarmálaráðið hevur fyri nevndini upplýst, at landsstýrið ætlar at boða hinum sáttmálapørtunum í norðurlendsku tvískattaavtaluni frá, at Føroyar skifta linkingarhátt, á sama hátt sum hini Norðurlondini í høvuðsheitum hava gjørt.

Farið verður frá undantøku (eksemption) til frádrátt (credit). Broytingin verður ætlandi frá inntøkuárinum 2025. Hetta fer í praksis at merkja, at ein inntøka fer frá bert at verða skattað í arbeiðslandinum til bæði at verða skattað í arbeiðs- og bústaðarlandinum, tó soleiðis, at

bústaðarlandið gevur frádrátt í álíknaða skattinum í bústaðarlandinum fyri skatt goldnan í arbeiðslandinum.

Samstundis hevur fyriliggjandi uppskot við sær, at uttanlandsfrádrátturin verður stigvíst avtikin komandi 5 árini. Eftir 5 árum er frádrátturin sostatt heilt burtur. Undir viðgerðini hevur verið víst á, at við avtøkuni av uttanlandsfrádráttinum fara hesir persónar ongan botnfrádrátt at hava. Tí ynskir meirilutin ikki at avtaka uttanlandsfrádráttin heilt, og fer tí við broytingaruppskoti at mæla til, at frádrátturin verður 48.000 kr. frá 2026.

Sosial gjøld

Í fylgiskjali 2 til lógaruppskotið verður víst á, at eftir at staðfest er, at bæði heilsutrygdargjaldið og gjaldið til Samhaldsfasta eru fevnd av norðurlendsku sosialkonventiónini, er ikki longur grundarlag fyri frádráttinum fyri sosiala trygd, og tí verður hesin frádráttur strikaður.

Nevndin hevur fingið upplýst, at lógaruppskot viðvíkjandi frítøku fyri gjald til Heilsutrygd er á veg í hoyring og verður lagt fyri Løgtingið fyrst í komandi ári.

Viðvíkjandi Samhaldsfasta kann søkjast um undantak fyri gjaldinum sambært norðurlendsku konventiónini. Viðvíkjandi kravdum eftirlønargjaldi er persónur, ið hevur eftirløn í NAV, frítikin fyri bundna eftirlønargjaldið í Føroyum, sbrt. § 3, nr. 18 í eftirlønarlógini. Er talan um aðrar nøktandi pensjónsskipanir enn NAV, kann søkjast um frítøku eftir somu áseting.

Sambært TAKS verða umleið 22 mió. kr. goldnar til sosiala trygd uttanlands. Tá ið hesin frádráttur dettur burtur, skal inntøkan býtast millum land og kommunur. Mett verður, at kommununar partur av hesum er umleið 9 mió. kr.

Við hesum viðmerkingum setir meirilutin fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

1. Frágreiðandi heitið verður orðað soleiðis: "(Skattaumskipan 2024 og 2025, stigvís minking av fiskimannafrádráttinum, samdøgursfrádráttinum og uttanlandsfrádráttinum)"

2. § 1, nr. 1 verður strikað.
   § 1, nr. 2 verður eftir hetta § 1, nr. 1.

3. Í § 1, nr. 2, sum verður nr. 1, verður í § 33, nr. 12, 4. pkt., litra c "2026" broytt til: "2026 og frameftir"

4. Í § 1, nr. 2, sum verður nr. 1, verður í § 33, nr. 12, 4. pkt. litra d strikað.

5. § 1, nr. 3 verður strikað.
   § 1, nr. 4 verður eftir hetta § 1, nr. 2.

6. Í § 1, nr. 4, sum verður § 1, nr. 2, verður í § 33, nr. 13, litra c "2026" broytt til: "2026 og árini fram"

7. Í § 1, nr. 4, sum verður § 1, nr. 2, verður í § 33, nr. 13 litra d strikað.

8. § 1, nr. 5 verður strikað.
§ 1, nr. 6-7 verða eftir hetta § 1, nr. 3-4.

9. § 2 verður orðað soleiðis:

"**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2024."

Viðmerkingar

Til nr. 1:

Talan verður ikki longur um avtøku av samdøgursfrádráttinum og uttanlandsfrádráttinum, men um stigvísa minking. Tí verður frágreiðandi heitið broytt samsvarandi.

Til nr. 2, 5, 8 og 9:

Talan er um fylgibroytingar í sambandi við broyting nr. 3-4 og 6-7.

Til nr. 3 og 4:

Við hesi broyting verður samdøgursfrádrátturin verandi kr. 120 um samdøgrið, eisini aftaná 2026, heldur enn sum eftir uppskotinum hjá landsstýriskvinnuni at lækka eitt stig afturat í 2027 og falla heilt burtur í 2028.

Til nr. 6 og 7:

Við hesi broyting verður uttanlandsfrádrátturin verandi kr. 48.000, eisini aftaná 2026, heldur enn sum eftir uppskotinum hjá landsstýriskvinnuni at lækka eitt stig afturat í 2027 og falla heilt burtur í 2028.

Við hesum viðmerkingum og broytingaruppskoti tekur meirilutin undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Minnilutin (Beinir Johannesen, Magnus Rasmussen og Steffan Klein Poulsen) hevur hesar viðmerkingar:

Endamálið við uppskotinum er at skerja fiskimannafrádráttin yvir tvey ár, skerja uttanlandsfrádráttin yvir eitt áramál, avtaka samdøgursfrádráttin og avtaka § 154 b. Sagt verður, at hetta skal eitast at enda eini skeiklan av arbeiðsmarknaðinum og økja um arbeiðsútboðið.

Fiskimannafrádrátturin

Fiskimannafrádrátturin kom av fyrstan tíð, tí tað var torført at fáa manning til tey føroysku fiskiskipini. Spurningurin kann tí verða settur, um tað enn er neyðugt við frádráttinum. Minnilutin er av tí áskoðan, at tað er.

Tað er tørvur á arbeiðsmegi allastaðni í samfelagnum, men er hesin tørvur sera eyðsýndur á fiskiskipum undir Føroyum. Tað er kanska torførari enn nakrantíð at manna skipini í dag, og ger hetta ikki støðuna betri. Heldur kann hetta fáa ta avleiðing, at útboðið av arbeiðsmegi í hesari vinnu minkar ístaðin fyri at økjast, ið uppskotið annars sigur, at hetta ger.

Hyggja vit at grannalondum okkara, so hava øll líknandi skipanir fyri sjófólk. Í Noreg verður frádrátturin øktur, samstundis sum ætlanin her er at skerja frádráttin. Hendan ætlanin kann tí gera, at vit í Føroyum tapa í kappingini um hesa arbeiðsmegina. Aðrastaðni vil man vísa hesum starvsbólki størri virðing, men her verður gjørt mótsatt.

Hetta fer at gera hugin hjá fólki í vinnuni minni, og ikki minst fyri komandi ættarlið at velja fiskivinnuna. Undir nevndarviðgerðini er komið fram, at talið av føroyingum í føroyska fiskiflotanum er støðugt minkandi, eisini í tí partinum, har inntøkan er munandi hægri enn tey flestu størvini á landi geva. Tí er hetta ein skeiv kós at fara, og fer tað at fáa avleiðingar.

Uttanlandsfrádráttur v.m.

Í áratíggjur hava føroyingar leitað sær út um føroysku landoddarnar at vinna til dagsins uppihald. Sum tikið verður til, so hevur føroyski sjógvurin mangan verið kargur, og tá hevur tað verið gott, at møguleiki er hjá arbeiðsmegini at vera flytfør.

Hyggja vit nøkur fá ár aftur í tíð, var støðan tann, at arbeiðsútboðið var ikki høgt í Føroyum, og tí valdu fleiri at starvast í útlondum. Síðan føroyska samfelagið hevur havt búskaparligan vøkstur, og arbeiðsútboðið somuleiðis er vaksið, er talið av fólki, ið arbeiðir uttanlands, minkað. Í 2022 var talið 8% av føroysku arbeiðsmegini sambært frágreiðing hjá Deloitte, sum nevndin hevur fingið útflýggjaða.

Hesar skipanir hava sum sagt gjørt tað møguligt at hava eina flytføra arbeiðsmegi. Tað ger samstundis tað, at hesin arbeiðsbólkurin ikki verður í sama mun ávirkaður av gongdini í landinum. Tað gevur føroyska búskapinum eina støðuga arbeiðsmegi, ið ikki fylgir sveiggjunum í føroyska búskapinum, ið er ein tilfeingisbúskapur, sum av nógvum orsøkum kann sveiggja.

Hendan rokningin, ið verður givin til føroyingar við starvsstaði uttanlands, er als ikki uttan avleiðingar. Tílík broyting fer altíð at hava broytta atferð við sær. Tað kann m.a. hava við sær, at fólk flyta bústað, tí tað ikki loysir seg at vera búsitandi í Føroyum í verandi starvi, og hesi tí kenna seg noydd at flyta. Fólk kunnu flyta í aðrar skipanir, ið geva líknandi sømdir, ið landsstýrið ikki broytir. Tí kann tað eisini setast spurnartekin við, um hetta veruliga fíggjar nakran lætta, tá atferðin broytist.

Tað er betri at vita enn at gita. Undir viðgerðini av hesum málinum er tað vorðið greitt, at tað liggur ongin greining yvir, hvørjar víðari avleiðingar hetta kann hava við sær. Um fólk flyta antin av landinum ella í aðra skipan, hvat hesi fólkini leggja eftir seg í føroyska samfelagnum o.s.fr. Frágreiðingin hjá Deloitte nevnir m.a., at lønarinntøkan, ið hesin bólkurin hevur, er við til at generera eina milliard krónur í føroyska samfelagsbúskapinum. Tí má staðfestast, at hesar broytingar kunnu fáa stórar avleiðingar fyri búskapin.

Tá barnafrádráttur herfyri bleiv veittur sendifólki, segði landsstýriskvinnan í fíggjarmálum, at hetta var fyri at javnstilla okkara sendifólk við tey í grannalondunum. Tí kann tað undra, at sama prinsipp ikki er galdandi í hesum føri. Í okkara grannalondum verður veittur frádráttur til fólk, ið starvast

uttanlands eins og til tey, ið starvast á fiskiskipum. Vandi kann tí vera fyri, at vit tapa í kappingini á hesum øki til okkara grannalond. Hyggja vit innanlands, so skeikla vit eisini við hesum uppskotinum. Onkur skipan verður tikin av, aðrar verða verandi. Samdøgursfrádráttur skal skerjast hjá teim, ið arbeiða uttanlands, men fólk í almennum starvi, herímillum politikkarar, fáa framvegis sama samdøgursfrádrátt, tá tey hava starvsørindi uttanlands.

Minnilutin metir samanumtikið, at hetta uppskot fer at hava neiliga ávirkan á okkara vinnu og samfelag, og eigur hetta tí ikki at verða framt.

Við hesum viðmerkingum tekur minnilutin ikki undir við málinum og mælir Løgtinginum frá at samtykkja uppskotið.

Fíggjarnevndin, 11. desember 2023

Eyðgunn Samuelsen forkvinna	Beinir Johannesen næstformaður	Bjarni Hammer
Eirikur í Jákupsstovu	Hanna Jensen	Magnus Rasmussen
	Steffan Klein Poulsen	